## U15 og U17 mugu bíða

U15 og U17 landsliðini, sum skuldu fara til Aberdeen at luttaka á Aberdeen International Football Festival í gjár, sluppu ikki avstað. Floglíkindini vóru ikki verið til vildar. Ferðalagið skuldi avstað seinnapartin, men í gjárkvøldið vóru menninir ikki slopnir úr Vágunum. Í morgun visti Eli Hentze, sum skuldi við til Aberdeen, at siga, at teir tá bíðaðu eftir boðum, men vónaðu at tað ikki fór at vera alt ov leingi at bíða.



## Agger aftur á vøllinum

Danski verjuleikarin hjá Liverpool, Daniel Agger, er loksins aftur á vøllinum, eftir at hava sitið uttanfyri meginpartin av farna kappingarárið. Leygardagin spældi Liverpool venjingardyst móti Tranmere, og Daniel Agger spældi fyrstu 75 minuttirnar, áðrenn hann varð útskiftur. – Eg eri ógvuliga fegin um at vera aftur, og hetta hevur verið ringasta tíðin í mínum fótbóltslívið, sigur Daniel Agger við heimasíðuna teamtalk.com. Venjarin hjá Liverpool, Raphael Benitez, fegnast eisini um, at miðverjin aftur er tøkur. – Hann hevði ongar trupulleikar, og tað er gott fyri liðið, staðfestir hann yvirfyri enskum miðlum.

## Dreka genturnar aftur sannførandi sigur

Eftir startspurtin var ongantíð ivi um, at tað fór at verða Drekin, sum vann, meðan kappingin um næstfremsta plássið var rættuliga stór

KAPPRÓÐUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Dreka genturnar hava beina kós ímóti FM heitinum. Á vestanstevnu í Miðvág vunnu genturnar hjá Havnar Róðrarfelag tryggan sigur.

Eftir startspurtin var ongantíð ivi um, at Drekin fór at vinna. Stútt og støðugt øktist munurin aftur til hinar bátarnar stútt og støðugt, og á málinum var munurin ein bátslongd.

Talan var um stóra kapping um næstfremsta plássið. Hvassi, sum fyrr í summar hevur vunnið fleiri róðrar, kom næstfremstur á mál, og Jallurin, sum treiskaðist væl og leingi, endaði á triðja plássi.



*Eingin ivi var um, at Drekin skuldi vinna vestanstevnuróðurin hjá gentumanningunum*

Mynd: Jens Kr. Vang

# Dreingirnir á Sílinum á tryggari FM kós

**Fyri sættu ferð av seks møguligum smurdu dreingirnir í Havnar Róðrarfelag allar hinar av**

KAPPRÓÐUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Dreingirnir á Sílinum hava verið í flokki fyri seg higar til hetta kappingarárið*

Mynd: Jens Kr. Vang

Tað var einki at rafla um. Eftir at tað í fyrstu tøkunum hevði sæð út til, at tað kanska skuldi verða eitt sindur javnur róður, so broyttist myndin skjótt og nógv.

Dreingirnir á Sílinum hava verið framúr í fimm teimum undanfarnu kappingunum, og á vestanstevnu vóru dreingirnir á Sílinum uppaftur meiri sannførandi, enn teir higartil hava verið.

Sílið fór sendandi undan øllum hinum. Á málinum vóru dreingirnir hjá Havnar Róðrarfelag meiri enn tvær bátslongdir frammanfyri teir næstu.

Sigurin ber við sær, at Sílið nú hevur 42 stig, og nú skal tað vilja verri enn illa til, um havnardreingir ikki skulu vinna FM. Teir eru undan ólavsøku sjey stig undan Havfrúnni.

Junkarin úr Kvívík bjóðaði leingi grannunum úr Vestmanna av. Havfrúgvin tóktist eina løtu at vera eitt sindur trilvandi, men á málinum vóru teir úr Vestmanna undan teimum úr Kvívík. Munurin var ikki meiri enn skuturin.

Tjaldrið var væl við í kappingini, og á málinum var hann eina stóra hálva bátslongd aftanfyri Junkaran.

# Sílið svam frá avbjóðarunum

**Kvinnurnar hjá Havnar Róðrarfelag vóru leingi í kapping við Erlu Kongsdóttir, Katlu og Frúnna**

KAPPRÓÐUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Talan er ikki um matematiska vissu, men kvinnurnar á Sílinum skulu bara hava stig á ólavsøku fyri at vissa sær FM-heitið*

Mynd: Jens Kr. Vang

Tað var einki at rafla um. Sum tað hevur gingið í fimm teimum fyrstu kappingunum, so gekk tað eisini, tá ið kvinnurnar umborð á 5-mannaførunum kappaðust.

Í startspurtinum vóru tað fleiri, sum høvdu hug at bjóða av, og starturin var ikki góður hjá Sílinum, sum hevði trupulleikar saman við Frúnni úr Miðvági.

Men tá ið hálvt málið var røgvið, hevði Sílið lagt seg á odda, og síðani hugdu kvinnurnar hjá Havnar Róðrarfelag ongantíð aftur um seg. Á málinum var munurin aftur til kappingarneytarnar ein stór hálv bátslongd, eftir at hann eina løtu hevði verið størri enn so.

Harvið hevur Sílið vunnið allar seks róðrarnar. Sílið hevur 42 stig, og tí kann tað næstan við vissu staðfestast, at kvinnurnar hjá Sílinum hava vunnið FM.

Frúgvin úr Miðvági hevði einki serligan start, men í endaspurtinum gjørdu tær úr Miðvági ein orduligan vørr. Frúgvin tók Erlu Kongsdóttir, sum eina løtu var á odda, og Katlu, og á málinum fram til Sílið ein lítil hálv bátslongd.